## DAGSINS MEINING

# Gott tiltak

Í hesum døgum verður skipað fyri orku- og umhvørvisráðstevnu í Havn. Tað er Føroya Náttúruverndarfelag, sum skipar fyri tiltakinum, ið má sigast at vera eitt bæði skilagott og neyðugt tiltak í tíðum, har so nógv verður tosað um bæði umhvørvi og orkumál.

Tað hevur eydnast stigtakarunum at fáa serfrøðingar úr fleiri londum til Føroya at vera við á ráðstevnuni. Tað hevur so eisini eydnast at fáa SEV at vera við og er tað gott, at ein felagsskapur sum SEV, ið stendur fyri allari orkuútbygging í Føroyum og harvið eisini hevur ábyrgd av umhvørvinum, ikki hevur sett seg upp á bakbeinini, tí tað hevur verið funnist at stovninum so oftani, men vil medvirka til at finna skilagóðar loysnir. Í hesum sambandi kann nevnast, at hugaligt er at hoyra SEV-stjóran vísa ein góðan vilja til at royna alternativar orkuútbyggingar, eitt nú á vindmylnuøkinum, men eisini í sambandi við alduorku og grønari orku sum heild, har eitt nú grannar okkara Ísland liggja frammaliga.

Áhugavert var at hoyra, at Ísland, grannaland okkara, sum vit oftani eru so fegnir at samanbera okkum við ella at vísa til, er tað landið í heiminum, sum framleiðir mest av grønari orku. Heili 67% av orkunýtsluni har eru frá grønari orku tvs. vatninum og her ikki minst heita vatninum. Einasta stað har teir gera serligt brúk av olju er í fiskiflotanum og í ferðsluni á landi. Men eisini har eru íslendingar undangongufólk. Teir eru rættiliga frammaliga við í arbeiðinum at kunna brúka vatnið til brintorku eisini. Og teir tríggir fyrstu bussarnir við hesi reinu og nýggju orkuni fara skjótt at koyra. Hetta verður gjørt saman við altjóða oljufeløgum.

Nettupp hetta við samstarvi við aljtóða oljufeløg er nakað, sum vit føroyingar eiga at raðfesta høgt. Vit síggja longu eina byrjan, har oljufelagið Agið hevur stuðlað royndunum hjá føroyingum at kunna seg við alduorku. Nú lagt verður upp til eina komandi oljuvinnu her á landi er tað hugsandi, at eitt slíkt samstarv verður ment, tí bæði BP og Statoil hava víst seg at vísa alternativum orkukeldum stóran ans. Og nú tá Ísland kann vera undangonguland á onkrum øki saman við oljufeløgunum hví kunnu vit føroyingar tá ikki eisini taka á okkum ta ábyrgd tað er at menna grønu orkuna.

Verður nógv olja funnin við Føroyar eiga vit at umhugsa at seta pengar í ein grunn, sum bara skal hava til endamál at menna alternativar orkumøguleikar. Latið okkum saman við Íslandi verða undangonguland á tí økinum. Og nettup nú tá tosað verður so nógv um at menna granskingina her á landi og at geva okkara ungu fólkum eina meining og eitt mál við síni gransking, kundi tað verið áhugavert at kanalisera oljupengar til gransking í alternativa orku og harvið reint umhvørvi. Latið okkum m.a. brúka hesa ráðstevnuna til at byggja eitt slíkt fundament upp. Tá eru nógv størri perspektiv í møguligum komandi oljupengum enn bara at hugsa um, at teir skulu vera okkum enn eitt bein at standa á. Tað er gott men vit hava eisini eina globala ábyrgd og verður stórt ríkidømi funnið í okkara undirgrund eiga vit at kenna tað sum okkara skyldu til eisini at brúka hetta ríkidømið skilagott, solidariskt og til felags besta, eisini uttan fyri okkara egnu landoddar.

Nógv áhugvert er komið fram á ráðstevnuni, sum vit vónandi fara at hoyra meira til í næstum. Í hesum sambandi er tað at fegnast um, at stigtakararnir hava fingið fjølmiðlamannin Johan Mortensen til at standa sum orðstýrari, ikki minst tá hugsað verður um hansara stóra og inniliga áhuga fyri at varðveita eitt reint og vakurt náttúruumhvørvi her á landi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú bløðir útjaðarin aftur

**Jóhan Magnussen**

Nú hevur aftur eitt verkfall rakt útjaðaran, sum bløðir. Ja kanska bløðir hann út hesaferð. Men løgtingsmenninir sita og gníggja hendurnar, nú teir eru afturvaldir.

Teir tosa um bygdamenning millum valini, men úrslitini eru vánalig. Verkfall á hvørjum ári, og hvørja ferð er tað útjaðarin, sum raktur verður.

Hesaferð standa eitt nú ruskposarnir og dampa, meðan brennievnið gongur undan, og fólk gjalda í dýrum dómum fyri at sleppa til arbeiðis við bátum, sum óblúgvir taka okursprísir fyri at flyta fólk um sundini.

Verkfallið, sum nú er, er stríð millum Karsten og Ellint, men tað rakar okkum, sum búgva í útjaðaranum. Teir kundu fyri langari tíð síðan havt avgreitt hetta, sum teir vistu fór at koma.

Fullveldismenninir siga, at teir skulu stýra hesum landinum, men hetta sum nú hendir, er eitt gott barometur fyri, hvat fer at henda, um teir fáa makt, sum teir hava akt. Hetta er í hvussu er ikki nakað, sum strimbrar fólki í at koma aftur hendanveg.

Allir tit, sum valdir eru á ting fyri útjaðaraøkini. Takið tykkum nú saman og vísið tykkum sum menn. Loysið hetta málið beinanveg.

# So hendi tað aftur
# …útjaðarin avskorin frá restini av landinum

**Steinbjørn O. Jacobsen**
*borgarstjóri*



Sum borgarstjóri í næststørstu kommununi í landinum er tað mín greiða skylda at gera vart við, at Klaksvíkin og Norðoyggjar saman við hinum útjaðaraøkjunum í Føroyum enn einaferð er í eini vanlukkuligari støðu orsakað av verkfalli, sum hevur lagt farleiðina um Leirvíkarfjørð lamna.

Kommuna okkara, sum telur útivið 5000 íbúgvar og við vinnufyritøkum, ið umboða ein stóran part av útflutningi Føroya, liggur avskorin frá restini av landinum.

Óneyðugt er at greiða frá, at hetta rakar fólkið, sum her býr, sera meint, tí sambandið tvørtur um Leirvíksfjørð er so at siga einasta farleiðin hiðani og er tí ein lívsæðr hjá kommunu og øki okkara.

Familjurnar her verða alsamt harðari raktar av stongslinum. Eitt nú er summarfrítíðin hjá teimum flestu fyri langari tíð síðan løgd til rættis og goldin, men tey sleppa ikki avstað við sínum egna bili.

Børnini og ungdómurin eru eisini illa fyri av hesum, tí verkfallið forðar fyri fleiri av teimum tiltøkum, sum ætlaði eru teimum – bæði innan ítrótt, mentan og frítíð – og eisini hevur hetta avleiðingar fyri skúlagongdina.

Ein tann størsti og mest ítøkiligi skaðin av hesi vanlukkuligu støðu hjá okkum í útjaðaranum rakar vinnulívið, sum frammanundan er verri fyri í kappingini við meginøkið vegna ferjusambandið, ið ikki er eins gott og fast samband. Nú als einki samband er um fjørðin, rakar hetta sera meint.

Umhvørvisliga er hetta eisini ein hóttan ímóti øki okkara, tí heldur ikki ruskið verður tikið, og vit kunnu longu nú staðfesta, at hetta hevur umhvørvisligar avleiðingar við sær.

Hesi støðu kunnu vit als ikki liva við, og vil eg við hesum vegna Klaksvíkar Býráð harðliga mótmæla, at ein ósemja á arbeiðsmarknaðinum enn einaferð tekur okkum í útjaðaranum til gíðslar – hetta kann undir ongum umstøðum góðtakast.

Tað má og skal finnast ein skipan, sum tryggjar, at henda gíðslatøka av einum minniluta í samfelagnum verður steðgað og ongantíð aftur endurtikin.

Eg vil staðiliga heita á partarnar í hesi trætu, sum leggur økið okkara lamið, um beinanvegin at fara aftur til samráðingarborðið við tí neyðuga viljanum til at finna fram eina semju.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.





